# Svanarungar klaktir í Plantasjuni í Havn

**Seinasti leygardagur var ein merkisdagur í føroyskari náttúrusøgu: Fyri fyrstu ferð í fleiri øldir eru ungar av Okn klaktir í Føroyum. Oknaparið í ovari tjørnini í viðarlundini í Gundadali í Havn kom út við tveimum ungum**

SVANARUNGAR



*Fuglurin er ógvuliga tykkin og skjarrligur hesa tíðina. Skógrøktin heitir tí staðiliga á tey vitjandi um ikki at órógva oknirnar*

Bøgan legðist at bøla eggunum beint áðrenn miðjan apríl mánaða, og steggin hevur vart reiðrið síðan. Í reiðrinum vóru trý egg, men bert tvey teirra klaktust.

– Fuglurin er ógvuliga tykkin og skjarrligur hesa tíðina. Heitt verður tí staðiliga á tey vitjandi um ikki at órógva oknirnar. Farið ikki ov nær fuglinum, verið bert á gøtunum; og haldið ongan gang, sigur Tróndur Leivsson, landsskógarvørður.

Okn (Cygnus cygnus), ella Sangsvanur, ella bara Svanur, sum hann eisini verður róptur, var búfuglur í Føroyum fram til umleið 17. øld (Williamson 1970), tá hann varð avoyddur. Síðani kenna vit slagið bert sum flytifugl; ið støðast styttri ella longri bil á vøtnum okkara vár og heyst á síni ferð millum vetrarvistin, serliga í Bretlandi, og summarvistin í Íslandi og Norður Skandinavia. Í Føroyum eru tríggir oknadalar (á Sandoynni, í Vágunum og í Eysturoynni).

Í viðarlundini í Gundadali hava oknir verið í tjarnunum síðan einaferð í sekstiárunum. Talan er um fugl, ið, niðurundirkomin av svongd, sjúku, síkum ella tílíkum, ikki hevur orkað at fara víðari. Skógrøktin hevur síðan fingið fuglarnar í varðveitslu, og eftir viðgerð hevur eydnast at fáa nakrar av teimum at yvirliva. Oknirnar hava tá verðið sleptar í tjarnirnar í viðarlundini til stóra fragd hjá teimum vitjandi, serliga børnunum, ið so trúliga hava givið fuglinum breyð, aftrat fóðrinum frá røktaranum.

– Fyri umleið 15 árum síðan varð avrátt at vita, um oknirnar í viðarlundini eisini kundu nýtast til at stuðla undir einum meira yvirskipaðum máli, nevniliga at endurreisa ein nýggjan oknastovn í Føroyum. Í 1990 komu nakrar oknir higar úr Íslandi, men tann royndin gav tó einki úrslit. Seinni eru bert fuglar, fyrilagstir ymsastaðni í landinum, komnir aftrat. Hóast nógvar royndir, er tað nústani eydnast at fáa eitt par, ið hevur vorpið troðin egg, sigur Tróndur Leivsson, landsskógarvørður.

Bøgan, ið nú er komin út við tveimum ungum, er frá 1992. Anton Petersen fangaði hana í Vági á heysti 1992. Steggin er frá 1996. Kurt Svendsen fangaði hann í Sumba á vári 1997. Parið hevur hildið til í teirri ovaru tjørnini í viðarlundini í Gundadali síðan 2002.

Annars er at siga, at teir fyrstu svanirnir í viðarlundini í Gundadali vóru Knópsvanur (Cygnus olor), fingnir úr Djóragarðinum í Keypmannahavn í fyrru helvt av 20. øld. Hesir fingu eisini ungar, men slagið livir ikki vilt um okkara leiðir; næstu búfuglarnir av tí slagnum eru at finna í Vestur Skotlandi.



*– Farið ikki ov nær fuglinum, verið bert á gøtunum; og haldið ongan gang, sigur Tróndur Leivsson, landsskógarvørður*

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 21, 2004
www.kaupthing.fo

# Framgongd at hóma í Evropa

MARKNAÐARRÁK

Farna fríggjadag vóru tøl fyri búskaparvøksturin í evruøkinum kunngjørd. Tølini vístu, at árligi vøksturin í 1. ársfj. gjørdist 1,3% sammett við 0,6% ársfj. frammanundan. Hóast tølini eru munandi lægri enn í USA, vísa tey eina positiva gongd og staðfesta, at vøksturin í Evropu er um at koma seg.

Størsti vøksturin hevur verið at sæð í Fraklandi; sum heild er tað útflutningur, ið hevur økt um bruttotjóðarúrtøkuna í evruøkinum. Orsøkir eru m.a. viknaða evran, ið ger evropiska búskapin meira kappingarføran og framgongdin í USA, sum hevur økt eftirspurning eftir m.a. evropiskum vørum.

Seinasta gongdin í evropiska búskapinum stuðlar metingina um, at áður væntaða rentulækkingin í Evropa endaliga er avlýst. Næsta rentuinntriv verður ein rentuhækking, men ein slík skal ikki væntast við bræði.

Síðani seinasta vár er oljuprísurin hækkaður meira enn 60% og hevur seinastu dagarnar ligið omanfyri 40 dollarar fyri tunnuna. Orsøkin til hækkingina í seinastuni er, at lítið er í oljugoymslunum í USA samstundis sum altjóða eftirspurningurin er methøgur. Møguleiki er fyri, at oljuprísurin kann hækka meira og hetta økir um váðan fyri, at hesin kann tálma búskaparvøksturin í Evropa, ið júst er um at koma seg. Um so verður kunnu lánsbrævarentur lækka aftur, men hóast búskaparvøksturin verður lagdur undir trýst, kunnu lægri rentur stuðla partabrøvunum.

Roknskapirnir, ið vóru kunngjørdir í farnu viku, vóru misjavnir. Meðan Lundbeck, GN og Cisco høvdu góð tíðindir at bera, kunngjørdi Dell ein vánaligan roknskap. Hesa vikuna kunngerða m.a. Topdanmark, ISS, Coloplast og Hewlett-Packard.

Bæði láns- og partabrøv vóru sera óstøðug í farnu viku, og hendan vikan verður væntandi ikki øðrvísi. Fáar búskaparkunngerðir verða og yvirgangur er ein støðug hóttan. Realkreditt lánsbrøv stóðu seg sera illa mótvegis statslánsbrøvunum. Tískil kann ein mótrørðsla væntast, soleiðis at realkredittarnir vinna nakað aftur.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig | |
|---|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% | → |
| 2 ára lánsbræv | 2,69% | -0,06% | ↓ |
| 5 ára lánsbræv | 3,82% | -0,01% | ↓ |
| 10 ára lánsbræv | 4,47% | -0,01% | ↓ |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| KFX, Danmark | 248,3 | -0,5% | ↓ |
| OMX, Svøríki | 652,4 | 0,0% | → |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.606,7 | -2,0% | ↓ |
| S&P 500, USA | 1.095,7 | 0,8% | ↑ |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 103,93 | -0,4% | → |
| Evru Lánsbrøv | 164,37 | -0,5% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 75,25 | 1,4% | ↑ |
| Altjóða Vøkstur | 63,28 | -0,1% | ↓ |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 617,73 | -1,6% | ↓ |
| EUR | 744,06 | 0,0% | → |
| GBP | 1.092,19 | -2,1% | ↓ |
| NOK | 90,21 | -1,2% | ↓ |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



Russarar og manningin á Sigurfarinum:

# Fingu tosað um lagnutilburðin

**Leygarmorgunin hittust teir sjey russararnir, sum komu til landið mikudagin, og meginparturin av manningini umborð á Sigurfarinum lagnunáttina tann 16.02.1982. Ein kensluborin og rørandi løta, har fólk ferðaðust 22 ár aftur í tíðina og endurlivdu óhugnaligu náttina við Flemish Cap**

SAMEINING

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Spakuliga kom gongd á prátið millum føroyingarnar og russararnar. Og við hjálp frá tulki gekk tað væl at halda gongd í samrøðunum*

**Klaksvík:** Í kantinuni á Kryvjing sita menn og kvinnur. Øll á ein ella annan hátt samanbundin av tilburðinum, sum fór fram í illveðrinum við Flemish Cap í februar í 1982.

Prátið gongur stillisliga fyri seg, og fólk eru ógvuliga varin. Tað er onki at ivast í, at her er talan um eina hending, sum menn hava barst fyri at leggja aftur um seg og, sum nú skal fram aftur í ljósið.

Tó letur til, at øll eru á einum máli um, at hetta bara er gott fyri øll. Ein møguleiki at fáa endað nakað, sum tá og enn tann dag í dag tykist púra óskilligt.

Tað, at so nógvir mans lótu lív, er í sjálvum sær ein sorgarleikur, men meðan menn greiða frá tilburðinum við Flemish Cap verður tað alsamt greiðari og greiðari fyri einum, hvussu meiningsleyst hetta í veruleikanum var. Og hvat fyri kenslum og minnum hesir 26 tá blaðungu menn hava gingið við øll árini.

Onkrir einkultir smálutir verða nevndir, sum eru nóg mikið til at fáa tað at renna kalt niður eftir rygginum á einum.

## Vildu ikki hava hjálp

Lítið er at ivast í, at tankin, sum hevur fylt mest í teirra sinni er, at teir kundu havt bjargað so nógv fleiri av russisku manningini.

Tí tað var nevniliga soleiðis, at russararnir ikki vildu hava hjálp frá føroyingunum. Teir høvdu samband við eitt annað russiskt skip, sum var fleiri tímar frá teimum. Og tí skipinum vildu teir so bíða eftir heldur enn at fara umborð á Sigurfari. Tískil kundi føroyska manningin onki annað gera, enn at hyggja at, meðan skipið spakuliga sakk undir russisku manningini.

Ikki fyrr enn tað stóð við gronini niður í sjógvin, og umleið helmingurin var farið undir, valdu teir at leypa í ísakalda sjógvin.

Og tá var tað, at manningin á Sigurfarinum fór í holt við at hjálpa teimum upp úr sjónum, men tá var tað tíverri ov seint fyri meginpartin av russisku manningini. Einans fimm teirra vóru á lívi, tá teir vóru komnir umborð. 14 lík tók føroyska manningin eisini upp. Og seinni doyði ein av teimum fimm umborð á Sigurfarinum. Og tað var einkjan eftir tann mannin, sum var millum tey sjey í ferðalagnum.

– Hatta var púrasta óskilligt fyri okkum og so ræðuligt bert at standa og hyggja at og onki fáa gjørt. Tað ber yvirhøvur ikki til at greiða frá hesum, tað má upplivast, sigur Árni, ein av føroysku manningini, eftir at prátið hevur gingið stillisliga aftur og fram eina løtu.

Hann og Sólarn sita saman við konunum við sama borð og minnast hesa náttina. Teir siga, at teir kendu báðar russararnar aftur beinanvegin, tá teir sóu teir hendan morgunin. Og tað lat eisini til, at russararnir kendu onkran av manningini aftur.

Russiski stýrimaðurin kendi kokkin aftur beinanvegin. Og so mannin, hvørs koyggju hann svav í og fekk heit og turr klæðir frá aftaná.

Á ein ella annan hátt so er tað hugtakandi bert at sita og lurta, meðan menn sita og tosa um hetta. Hvussu eftirtíðin var og so framvegis. Og hóast alt var ein sorgarleikur, so er hendan løtan á Kryvjivirkinum ein sera lívsjáttandi løta, har tøkkin fyri lívið er í hásætinum. Sorgartár blandað saman við gleðistárum samstundis sum menn tosa um hesa ræðuligu náttina, sum hevur merkt teir fyri lívið.

## Ongin kreppuhjálp

Um ein slík hending hevði farið fram í dag, so hevði skipið siglt inn og menn fingið kreppuhjálp. Ella fingið kreppuhjálp umborð. Men tað var ikki galdandi fyri 22 árum síðani.

Sólarn, Árni og hinir 24 umborð á Sigurfarinum fóru beint í fiskiskap aftur, tá eitt skip var komið eftir monnunum, sum teir høvdu tikið upp.

Deyðatøgn var millum menn í fleiri dagar eftir hendingina. Tað tók langa tíð, áðrenn samrøður vórðu førdar millum menn aftur. Og teir komu ikki aftur til Klaksvíkar fyrr enn tríggjar mánaðir seinni.

Stutt áðrenn norðoyastevnu í 1982 kom Sigurfari aftur til Klaksvíkar. Stórfingin móttøka var fyri teimum, og tað fekk døpru hendingina at fara í bakljósið eina stund. Men hóast tað so mundi hon mangan spøkja aftur hjá teimum. Og tað viðganga eisini fleiri, at hon hevur og enn ger tann dag í dag.

– Serliga um ein hoyrir um aðrar líknandi hendingar, ella sær okkurt í sjónvarpinum, so kann ein gott verða rørdur av tí. Eisini um tað er illveður, og ein er burtur, tá rennur hesin tilburðurin einum aftur í huga, greiðir Árni frá.

Teir duga ikki at greiða frá, hvussu lívið helt fram eftir tað, men tað gjørdi tað bara.

## Sigurfari brann

Ein hending sum eisini fekk menn á aðrar tankar beint eftir, at teir vóru komnir heim var, at eldur kom í Sigurfari. Mánadagin eftir norðoyastevnu kom eldur í skipið, og fór tað rættuliga illa. Hetta gjørdi so samstundis tað, at støðgurin heima eftir hendan minniliga túrin, gjørdist nógv longri enn ætlað.

Men sum sagt manningin hevur ongantíð tosað nakað serligt um tilburðin við Flemish Cap síðani. Okkurt einkult dømi, har onkrir hava tilvildarliga hitst, kom tosið inn á hendingina, men ikki nakað, sum varð skipað.

Ikki fyrr enn leygardagin 15. mai 2004 - 22 ár eftir hendingina - á Kryvjivirkinum í Klaksvík, har fólk fingu tosað nøkur viðurskifti í gjøgnum og fingu vónina um, at ein endi nú kann fáast á hesum.

Minnunum fara menn helst altíð at liva við, men kanska hendan sameiningin gjørdi sítt til, at tað verður lættari framyvir. Bæði fyri russararnar og føroyingarnar.



*Ein av manningini á Sigurfarinum og russiski stýrimaðurin. Russiski stýrimaðurin hevur havt samband við skiparan Mikkjal Olsen javnan upp gjøgnum árini*



*Myndir frá tí minniliga túrinum lógu á einum borði, og eftir at Mikkjal hevði boðað frá, at tær vóru har, fóru fólk at hyggja at teimum*